# Sleppa ikki at kanna flogfør sum millumlenda í Thule

**Grønlendska landsstýrið hevur gjørt av at kanna øll sivil flogfør, sum lenda í Grønlandi, men hvørki grønlendingar ella danir sleppa at kanna flogførini, sum seta seg á hernaðarflogvøllinum í Thule**




*Hvørki danir ella grønlendingar sleppa at kanna flogfør, sum seta seg í Thule*

FLOGEFTIRLIT
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Tað er verjuavtalan, sum USA og Danmark gjørdu í 1951, sum ger, at hvørki danskir ella grønlendskir myndugleikar sleppa at kanna tey amerikonsku flogførini, sum seta seg í Thule. Eftir avtaluni hava amerikonsk flogfør óavmarkaðan rætt til at flúgva í loftrúminum yvir Grønlandi og at seta seg á landi.

Lars Emil Johansen, fólkatingsmaður, sigur við Information, at hetta er heilt burturvið, og at grønlendingar eiga at sleppa at stýra sínum uttanríkispolitikki sjálvir. Hann vísir á, at soleiðis sum støðan er, kunnu amerikanararnir ekkaleysir brúka flogvøllin í Thule til at flyta fangar, kjarnorkuvápn ella til okkurt annað ólógligt endamál.

John Blågreen, sum starvast á støðini í Thule sum samskiftismaður ímillum amerikonsku støðina og donsku verjuna, sigur við Information, at danskir myndugleikar kunnu ikki kanna eitt amerikanskt hernaðarflogfar, sum lendir í Thule, uttan at teir amerikonsku myndugleikarnir geva neyðugt loyvi til kanningina. Tað sama sigur Niels Ole Markussen hjá donsku verjuleiðsluni við blaðið.

Lars Emil Johansen er sera misnøgdur við, at amerikanararnir hava alt eftirlitið við støðini í Thule.

### Sum eitt hjáland

- Vit ána ikki, hvat hendir á Thule Air Base, tí danir gera avtalur við amerikanarar uttan at spyrja okkum eftir. Tað kann tí væl vera, at teir hava kjarnorkuvápn ella fangar umborð á flogførunum, uttan at vit fáa tað at vita, sigur fólkatingsmaðurin, sum eisini er fyrrverandi landsstýrismaður. Hann sigur seg eisini ivast í, at tann danska stjórnin raðfestir grønlendsk áhugamál serliga frammarlaga, tá hon ger avtalur við amerikanararnar.

- Tað er helst meiri umráðandi hjá stjórnini at røkta tað góða sambandið við USA, sum Danmark jú er í krĩggi saman við í Irak, sigur Lars Emil Johansen.

Lars Emil Johansen heldur, at grønlendingar fáa ikki betri eftirlit við støðini í Thule, fyrr enn Grønland sleppur at stýra sínum uttanríkispolitikki sjálvt. Hetta er eisini eitt krav, sum fleiri grønlendskir politikarar hava reist í sambandi við orðaskiftið um fangaflutning hjá CIA.

- Tá tað snýr seg um uttanríkispolitikkin, er Grønland framvegis eitt hjáland, sigur Lars Emil Johansen við Information.



*Lars Emil Johansen*

# Ov dýrt at taka Bourbon Dolphin uppaftur



Bourbon Dolphin fleyt leingi við kjølinum uppeftir, eftir at skipið var holvt (Mynd: Reuters)

**Vrakið av norska veitingarskipinum verður eftir øllum at døma liggjandi á botni millum Føroyar og Hetland**

FRÁLANDAVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tann 12. apríl í fjør holvdist norska hjálparskipið Bourbon Dolphin, tá tað var í ferð við at flyta akkerini hjá boripallinum Transocean Rather á einari oljuleið ímillum Føroyar og Hetland. Átta fólk doyðu.

Vrakið av Bourbon Dolphin liggur á 1100 metra dýpi. Líka síðani vanlukkuna hevur verið tosað um at taka vrakið uppaftur. Eitt nú vildu høvdu norsku myndugleikarnir áhuga í at bjarga vrakinum fyri at fáa staðfest endaliga, hví vanlukkan hendi. Ein serlig kanningarnevnd varð eisini sett at kanna tilburðin.

Men nú bendir alt á, at vrakið verður liggjandi á botni. Bourbon Offshore, sum átti skipið, hevur havt samband við fólk, sum hava serkunnleika til slíkar bjargingar, og niðurstøðan er, at ein tílík bjarging verður tekniskt sera krevjandi og harafturat so dýr, at reiðaríið maktar ikki at lyfta uppgávuna.

Tað hevur borið til at bjarga skipsvraki av 600 metra dýpi fyrr, men í hesum førinum er dýpið næstan tvær ferðir so stórt. Trond Myklebust, stjóri í Bounbon Offshore, sigur við Aftenbladet, at skipið verður ikki tikið uppaftur uttan so, at tann serliga kanningarnevndin krevur tað fyri at fáa greiði á, hví vanlukkan hendi.

- Men so verður tað helst staturin, sum má gjalda, sigur Trond Myklebust.

Nevndin, sum kannar vanlukkuna, skuldi eftir ætlanini koma við sínari frágreiðing tann 1. februar, men freistin er longd til tann 1. apríl.